## Dómurin stendur við

Deyðadómurin, sum norðmenninir Tjostolv Moland og Joshua French hava fingið í Demokratiska Lýðveldinum Kongo, verður ikki broyttur. Tað sigur hernaðardómarin Jean Philippe Nkiama Matra, oberstur, við norska Dagbladet. Hann sigur, at hernaðardómstólurin kann annaðhvørt staðfesta dómin ella senda hann aftur í rættin til nýggja viðgerð. Tann avgerðin fellur í summar. Teir báðir norsku leiguhermenninir vórðu dømdir til deyða í september í fjør fyri dráp og njósning. Teir noktaðu seg sekar.



## Serfrøðin kannast

Nú skal kannast, um hald er í teimum ávaringum og tilmælum, sum veðurlagsserfrøðingarnir hjá ST eru komnir við tey seinastu árini. Serfrøðingarnir hava verið fyri hvøssum atfinningum, síðani teir kunngjørdu ta seinastu frágreiðingina um, hvussu tann veksandi hitin á jørðini hevur ávirkað umhvørvið, og hvat fer at henda. Fleiri aðrir serfrøðingar eru komnir til onnur úrslit, og nú hevur ST gjørt av at kanna viðurskiftini. Altjóða granskingarstovnurin InterAcademy Council, sum umboðar 15 granskingarstovnar í ymsum londum, skal standa fyri kanningini, sigur Ban Ki-moon, aðalskrivari.

# Bara Huxa vil taka pengar frá kirkjuni

**Onki av hinum politisku ungmannafeløgunum er samt við ungmannafelagnum hjá Fólkaflokkinum at taka peningin frá kirkjuni. Tó hava fleiri onki ímóti at gera onkrar broytingar í parlagnum millum politikk og átrúnað**

KIRKJUPOLITIKKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Fólkafloksungdómur vil taka umleið 10 milliónir krónur frá kirkjuni og avtaka statskirkjuna. Men hini politisku ungmannafeløgini halda ikki, at sambandið millum land og kirkju skal slítast*

Onki av hinum politisku ungmannafeløgunum metir tað vera nakað gott hugskot at taka pengarnar frá kirkjuni, sum Huxa legði upp til í Sosialinum í gjár.

Tó eru fleiri ungmannafeløg, sum eru samd um, at hinar samkomurnar eiga at hava møguleika at fáa studning frá landinum.

Eisini er onkur sum metir, at skrásetingin av nøvnum væl kundi verið gjørd onkra aðrastaðni enn í kirkjuni.

### Vilja onki broyta

Ungdómurin hjá Tjóðveldi vil ikki gera nakrar broytingar í sambandi við parlagið hjá landi og kirkju.

– Vit halda, at politikkur og átrúnaður skulu vera at skyld, og tí halda vit ikki, at kirkjan skal skiljast frá statinum, tí so er vandi fyri, at hon blívur politisk. Tað síggja vit millum annað í Svøríki og í USA, har religiónin serliga í USA hevur stóra ávirkan á politikkin, sigur Gunnhild D. Niclasen, forkvinna í Unga Tjóðveldi.

Hon leggur afturat, at tey meta, at funktiónirnar hjá kirkjuni við kirkjubókunum fungera væl, og tí er ikki nøkur orsøk at gera broytingar í tí.

Um uppskotið hjá bispi, at hinar samkomurnar eisini skulu hava møguleika fyri stuðli er Unga Tjóðveldi ósamt.

– Tey hava ongar almennar funktiónir, sum skrásetingina, og tí er ongin orsøk til, at tey fáa gjald fyri tað, sigur Gunnhild D. Niclasen.

### Yvirtøkur enda soleiðis

– Hetta er eitt typiskt dømi um, at tá mann yvirtekur okkurt og lovar, at mann ikki ætlar at broyta nakað, og so byrjar mann at tosa um at broyta beinanvegin. Kirkjan skal hava arbeiðsfrið, sigur Arne Winthereig, formaður í Ungmannafelagnum Samband.

Formaðurin leggur tó afturat, at Ungmannafelagið Samband grundleggjandi gongur inn fyri, at samkomurnar eru javntstillaðar, og millum annað metir hann, at fólk ikki skulu vera fødd inn í fólkakirkjuna, men sjálvi skulu lima seg inn.

Viðvíkjandi stuðlis sigur Arne Winthereiga, at hinar samkomurnar skulu hava møguleika fyri stuðli frá landinum, um tær vilja hava hann.

Arne Winthereig leggur afturat, at kirkjan hevur nøgvar samfelagsligar funktiónir, sum ikki mugu undirmetast.

### Skráseting undir Mentamálaráðið

– Kirkjan umsitur nakrar praktiskar funktiónir og ger eitt gott arbeiði, sum hon sjálvandi skal hava gjald fyri, men at tað er eitt gott hugskot at flyta fólkaskrásetingina, so hon er religiøst óheft og verður løgd beinleiðis undir Mentamálaráðið.

Tó staðfestir Bergur A. Dalsgarð, at kirkjan skal hava studning.

– Mentan og religión skulu stuðlast av landinum, og tí taka vit ikki undir við hugsanunum hjá Huxa. Vit halda hinvegin, at stuðulin fyri religiøsan aktivitet skal fordeilast eftir aktiviteti, veri seg limatal og so framvegis, sigur Bergur A. Dalsgarð, formaður í Sosialistiskum Ungdómi.

Tískil leggur ungmannafelagið hjá Javnaðarflokkinum meira upp til uppskotið hjá bispi at lata pening til fleiri samkomur.

Felagið leggur afturat, at verður hugskotið hjá Huxa veruleiki, so verður neyðugt at taka nógvar aðrar grundleggjandi funktiónir til umrøðu.

### Frísamkomur skulu vera fríar

Arni Abrahamsen úr Ung fyri Miðflokkinum er grundleggjandi ósamdur við Huxa, at broytingar skulu gerast millum kirkju og stat, tí føroyska samfelagið er kristið.

– So leingi Føroyar eru eitt kristið samfelag, so hava vit brúk fyri fólkakirkjuni, sigur Arni Abrahamsen.

Hann leggur afturat, at hvør einasta króna kirkjan fær kann forsvarast við teimum funktiónum kirkjan hevur bæði í samband við skrásetingina og øðrum funktiónum í samband við høgtíðir til dømis.

Ung í Miðflokkinum eru eisini sterkt ímóti, at landið fer at lata beinleiðis stuðul til frísamkomurnar. – Tað er øgiliga vandamikið, um fríkirkjurnar verða tengdar at stuðli frá landinum, tí tað kann hava við sær, at landið leggur trýst á frísamkomurnar at hava eina ávísa hugsan um ymisk viðurskifti, veri seg samkynd ella okkurt annað, sigur Arni Abrahamsen, sum tó heldur, at onkur fyrimunur í skatti kundi verið latin til fólk, sum vilja lata pening til eina samkomu ella annað vælgerandi endamál.

### Pengarnir eru so lítlir

Jógvan Skorheim, formaður í Unga Sjálvstýri, heldur tað vera rættiliga undarligt, at Fólkafloksungdómur soleiðis fer eftir 10 milliónum hjá kirkjuni, tá nógv meira kann sparast nógva aðrastaðni.

Hann sigur somuleiðis, at kirkjan hevur nøkur grundleggjandi virði, sum eru verd at hugsa um, og tí skal hon hava pening.

Hinvegin er hann partvíst samdur við Sosialistiskum Ungdómi, at onkur annar enn kirkjan kundi umsitið skrásetingina.

– Kirkjan ger eitt gott arbeiði, men tað kundi eins væl verið onkur annar, sigur Jógvan Skorheim.

Hann leggur afturat, at hugskotið við eini meiri solidariskari skipan við stuðlinum kann vera gott.